# TÍÐINDASKRIV

**Landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um at játta studningslán.**

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, gjørdi mikudagin 24. mai 2006 av at geva 9 umsóknum tilsøgn um studningslán til bygging av eldrabúplássum.

Hetta fer at útvega 136 nýggj eldrabúpláss kring landið.

Svar er sent øllum umsøkjarum í postinum.

Hans Pauli Strøm upplýsir, at tað er álagt honum sambært lóggávuni at hyggja eftir tørvinum á eldrabúplássum kring landið, og tað er út frá hesi fyritreyt, at hann hevur gjørt av at veita stuðul til fylgjandi økir:

<u>Suðurstreymoy:</u>

- Bygging av ellis- og røktarheimi við Hoyvíkstjørn til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.
- Røktarheim á Boðaneshamri til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.
- Reststuðul til røktarheimið Tjarnargarð, kostnaður 280 tús. kr.

Í alt hevur landsstýrismaðurin gjørt av at veita góðar 24 mió. kr. til verkætlanir í Tórshavnar kommunu, sum fara at geva í alt 48 nýggj búpláss.

<u>Suðuroyggin:</u>

- Bygging av eldrasambýli á Tvøroyri til 16 búfólk, studningslán 800 tús. Kr.
- Bygging av røktarheimi í Vági til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.

Hesar játtanir skuldu gjørt at allur tørvurin í Suðuroynni verður nøktaður.

<u>Vestari partur av Heimarøktarøki 2, sum fevnir um Vestmanna, Kvívík, Leynar, Stykkið, Skæling, Vágar og Mykines:</u>

- Bygging av eldrasambýli í Sørvági til 10 búfólk, studningslán 500 tús. kr.
- Bygging av ellis og røktarheimi í Vestmanna til 24 búfólk, studningslán 12. mió. kr.

Hesar játtanir skuldu gjørt at allur tørvurin í Vágum og Norðstreymi verður nøktaður

<u>Norðoyggjar:</u>

- Bygging av eldrasambýli í Svínoy til 8 búfólk, studningslán 400 tús. kr.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHR@AHR.FO

Eysturoyggin:

- Víðkan av eldrasambýlinum í Gøtu frá 10 til 16 búpláss, studningslán 300 tús. kr.

Henda játtan skuldi gjørt at allur tørvurin í Eysturoynni verður nøktaður

Samanumtikið:

Talan er sostatt um tilsagnir uppá íalt góðar 50 mió. kr., ið sum nevnt fara at geva 136 nýggj eldrabúpláss tey næstu 2-3 árini.

Tørvskanningin, sum varð handað landsstýrismanninum í juli 2005 vísir, at tørvur er á 151 eldrabúplássum kring landið.

Við hesum er nærum komið á mál, og fegnast landsstýrismaðurin um, at politiskur vilji er frá bæði lands- og kommunumyndugleikum til at taka hesi stóru stig til frama fyri okkara gomlu, sum hava hesa røkt og umsorgan fyri neyðini.

Tórshavn, hin 26. mai 2006

Almanna- og heilsumálaráðið